## Tour de France hóttir CSC

Eftir útsagnirnar hjá Bjarne Riis um doping, verður nú sett spurnartekin við, hvørt Bjarne Riis skal hava loyvi at standa á odda fyri Team CSC, tá liðið tekur lut í stóru súkklukappingini. – Skal hann hava loyvi til tað. Hann var jú eisini stjóri hjá Ivan Basso í fjør, tá hesin hevði samband við Eufemio Fuentes. Er samband millum hetta og tað, sum Riis nú viðgongur? Tað er neyðugt, at sannleikin nú kemur á borðið, so vakra ítróttargreinin kann bjargast, sigur Christian Prudhomme, stjóri fyri Tour de France.



## Gascoigne undir skurð

Paul Gascoigne varð um vikuskiftið innlagdur á sjúkrahús, har hann fekk akutta viðgerð fyri magasár. Jane Morgan, sum er umboðsmaður hjá fyrrverandi enska landsliðsspælaranum, sigur við BBC, at spælarin er komin væl fyri seg, men at hann skal verða verandi á sjúkrahúsinum í nakrar dagar.

# Danska súkklu-stjørnan viðgekk doping-misnýtslu



*Bjarne Riis hevði ilt við at halda eyguni turr, tá ið hann fríggjadagin skuffaði allan súkkluheimin við at viðganga beiska veruleikan*
*Mynd: Polfoto/Jens Dresling*

**Fyrimyndin hjá so nógvum súkklarum var í veruleikanum eingin fyrimynd. Bjarne Riis var nevniliga fyltur av doping, tá ið hann í sínum gyltu árum vann seg fram til nógvar stórar sigrar**

SÚKKLING
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Fríggjadagin kl.15.30 kallaði Bjarne Riis til tíðindafund í heimbýi sínum, Herning. Luttøkan á fundinum var ovurstór, og fjølmiðlafólkini fingu tað, ið tey komu eftir. Nevniliga eina viðurkenning.

### Viðgekk dopingmisnýtslu

Tíðindafundurin byrjaði við at talsmaðurin hjá honum greiddi uppmøttu tíðindafólkunum frá mannagongdini, og síðan fekk høvuðspersónurin orðið. Frágreiðingin var ikki komin langt, tá ið hann viðgekk dopingina. Hann var týðiliga rørdur, og tárini vóru um at trilla niður eftir kjálkanum.

- Eg eri her í dag fyri at fáa sannleikan fram, samstundis við at fáa lagt tað býtta aftur um bak. Hetta hevur ikki verið torført. Eg havi tikið doping, og eg havi tikið EPO, ljóðaði tað frá Bjarne Riis, sum í dag er eigari og venjari hjá heimsins besta súkkluliði, Team CSC.

Bjarne var sum vera man keddur um svikið, ið hann hevur skuffað allan súkkluheimin við.

- Eg havi logið fyri øllum, eisini mær sjálvum. Eg vil hervið siga orsaka, men eg kann hinvegin frøast yvir, at tey, ið kenna meg, framvegis hava álit á mær. Eins og øll onnur, havi eg gjørt mistøk í lívi mínum. Hetta var mítt val og mítt mistak, helt Bjarne Riis fram.

### Basso setti hol á

Viðurkenningin kom ikki púrt av ongum. Fyri trimum vikum síðan traðkaði italska súkklustjørnan, Ivan Basso, fram, og viðgekk sína skuld í dopingmisnýtsluni. Roknað varð við, at hetta var byrjanin til fleiri viðurkenningar - og soleiðis bleiv.

Týska Team Telecom tykist at vera fyrsta liðið, sum av álvara traðkar fram, og leggur sonnu kortini ár borðið. Júst hjá Team Telecom var Bjarne Riis súkklari hjá gjøgnum 90'ini. Undan viðurkenningini hjá Riis fríggjadagin, høvdu longu fimm súkklarar á Team Telecom viðgingið dopingmisnýtsluna. Teir vóru Rolf Aldag, Udo Bölts, Christian Henn, Brian Holm og Erik Zabel. Tískil kom tað ikki heilt óvæntað á, at Bjarne Riis fríggjadagin mátti skuffa súkkluheimin við beiska sannleikanum.

Nú verður sett stórt spurnartekin við, um tann stóri Lance Armstrong eisini hevur verið dopaður. Hann hevur ikki heilt óundrunarvert vunnið heimsins størstu súkklukapping, Tour de France, heili fimm ár á rað.

### Fær ikki heiðurin frátiknan

Bjarne Riis vann í 1996 Tour de France. Tá var doping eftir øllum at døma ein partur av súkklingini, og tí var einki løgið í, at Bjarne eisini var dopaður. Revsingin fyri doping er sum vera man hørð, men í hesum førum er ikki lógligt at revsa hann.

Fremsti súkklarin í súkklukappingini súkklaði í eyðkendu gulu føraratroyggjuni, sum Bjarne eftir súkklukappingina vann til ognar. Ein troyggja, ið einki hevur at siga fyri hann longur.

- Eg eri errin av heiðrinum, sum eg bardist hart fyri. Eg var tó ikki ein rættur vinnari. Troyggjan liggur heima í bilhúsinum, og dopingvaldið er vælkomið eftir henni. Hon hevur ongan týdning fyri meg longur, segði Bjarne Riis at enda.

Heiðurin verður tó ikki tikin frá honum, av tí at tað eru heili 11 ár síðan hann vann heiðurin. Eftir átta ár sum eigari av gulu troyggjuni, hevur eingin myndugleiki rætt at taka hana frá honum.

### Gevst ikki so

Bjarne Riis hevur framvegis eitt súkklufelag og súkklulið at standa fyri, og hetta ætlar hann at halda fram við.

- Um nakar vil hava meg at gevast, so kann eg gera tað. Men eg haldi fast við, at súkkluheimurin hevur tørv á einum sum mær, sigur Bjarne Riis, sum framvegis má sigast at vera millum hægst virdu monnunum í súkkluheiminum. Frambrótandi úrslitini skuldu ikki spátt iva um stóru evni hansara.

# Bara botnurin at spæla um

**Oddaliðið B68 hevur fýra umfør at geva av, og tað skulu í hvussu so er trý umfør til fyri at koppa FSV04 av uppflytingarplássi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað leingist millum tey bæði toppliðini og hini. Í 11. umfari vunnu bæði B68 og FSV04, meðan ÍF, sum framvegis er á triðja plássi, einki fekk burturúr. Harvið er munurin frá B68 og aftur til ÍF tíggju stig.

Tað vil við øðrum orðum siga, at tað í hvussu so er skulu fýra umfør til fyri at fáa B68, sum enn ikki er farið stigaleyst av vølli, av uppflytingarplássi, og at tað skulu í hvussu so er trý umfør til fyri at fáa FSV04 av uppflytingarplássi.

Toppuppgerðin var í Fuglafirði, har tað var tætt og spennandi. Heimaliðið gav ikki gestunum av Toftum nakað eftir, men toftamenn høvdu marginalirnar á sínari síðu. Í einari støðu í 2. hálvleiki bjargaðu teir fleiri ferðir á málstrikuni, og í evstu løtu eydnaðist tað teimum at fáa sigursmálið.

Jann Ingi Petersen gjørdist púra leysur innanfyri ÍF verjuna í høgru. Í staðin fyri at royna sjálvur ímóti málinum, spældi hann skilagott upp á tvørs til Alexandro, sum var púra blankur, tá ið hann trillaði bóltin í tóma ÍF málið.

Í Leirvík eydnaðist tað endiliga LÍF aftur at fáa stig burturúr. Teir næstbestu í NSÍ vitjaðu, og tað var rættiliga spennandi. NSÍ var fyrstu stóru løtuna leikliga omaná, men teir fingu ikki mál. Seinna partin av 1. hálvleiki mentist heimaliðið, og tá skoraði Adrian Joensen tvey mál.

Í fyrra førinum stýrdi hann við høvdinum bóltin í málið eftir innlegg úr vinstru frá Magnusi Skoralíð, og í seinna førinum skoraði Adrian eftir innlegg úr høgru frá Sølva Vatnhamar.

Spenningur kom í aftur, tá ið ein tími var farin. Øssur Dalbúð sesndi við høvdinum bóltin í LÍF málið, men heimaliðið megnaði at halda tørn um tepru leiðsluna.

Í Sandavági megnaði FSV04 í tættari grannauppgerð at vinna 1-0. Einsamalla málið skoraði Hilmar Sveinbjørnsson tíggju minuttir undan steðginum. Fríspark úr stórari fjarstøðu rakti í handara stólpan og í høvdið á annars óføra SÍ málverjanum, áðrenn bólturin fór í málið.

Sørvingar eru niðarlaga á støðutalvuni, men teir góvu heimamonnunum ein skarpan gang – serliga í 2. hálvleiki.

Niðast av øllum er B36. Hesa ferð var árstalsfelagið partur av grannauppgerð í Gundadali. Unglingaspælarin Jóhan Petur Olsen legði HB framum, men Jóhan Ellingsgaard svaraði aftur undan steðginum, og í 2. hálvleiki kom einki mál.

Fimm ferðir á rað hevur tað ikki eydnast TB at vinna fulla úrtøku. Hesa ferð gekk betur. 2. hvítusunnudag vann TB 2-0 á Sevmýri ímóti teimum næstbestu í KÍ.

Einki mál kom í 1. hálvleiki. Eftir steðgin skoraði Allan Poulsen beinanvegin við góðum skoti úr brotsteiginum, og miðskeiðis í 2. hálvleiki økti Óli Johannesen, eftir at hann hevði fingið tamarhald á langari sending frá málverjanum, Ivan Stojkovic. Hesa ferð var Óli Johannesen alla tíðina í TB álopinum.

Nú verður steðgur í landskappingini inntil annan leygardag. Tá sær skráin soleiðis út: TB-LÍF, HB-ÍF, FSV04-B68, B36-NSÍ og KÍ-SÍ. Talan verður altso um toppuppgerð á Valloyrini í Sandavági.